# Viljin at kenna seg sjálvan og samstarva

**– Um vit nú venda okkum til tíðina í dag, so ljóðar kallið frá tíðarstreyminum líka hart sum fyri 110 árum síðani. Eisini í dag hava vit brúk fyri okkara fría vilja til at samstarva fyri sonnum framburði. Avbjóðingarnar eru stórar, men eg hugsi ikki, at tær eru størri, enn tær vóru. Nú eins og tá er pengaloysi ikki tann avgerandi forðingin. Men tann avgerandi forðingin er tann ikki at kenna sín vilja og seg sjálvan, ikki at seta sær mál og brúka tann fría viljan til tað ítasta í samstarvi fram ímóti málinum segði Turið Sigurðardóttir m.a. í røðu síni í Føgrulíð herfyri. Vit prenta røðuna**

**HÁSKÚLIN 110 ÁR**

*Turið Sigurðardóttir*

Í 1899, tíggju ár eftir at Føringafelag hevði sett føroyskan háskúla á stevnuskrá sína, fór Føroya Fólkaháskúli til verka her norðuri í Borðoynni.

Tað má sigast at vera skjótt atborið. Og Háskúlin hevur virkað í tey 110 árini ella teir 40.000 dagnar, sum farnir eru, síðan hann varð stovnaður: fyrsta árið á Stongunum í Klaksvík, frá 1900 til 1909 her í Føgrulíð, og tey seinastu hundrað árini, frá 1909 til 2009 í høvuðstaðnum.

Hvussu bar tað til, at tað eydnaðist so væl?

Vit kunnu royna at lýsa við søgulykt 110 ár aftur í tíðina, tá ið Háskúlin varð stovnaður. Hvussu vóru Føroyar og føroyingar tá?

Í 1899 var samfelagið langt síðan farið til gongu við tí endurreista løgtinginum 1852, fríhandli 1856 og fyrstu sluppunum frá 1870, broytingarnar steðgaðu ikki men vundu upp á seg við alt størri ferð. Nútíðargerðin kravdi meiri skúlagongd. Læraraskúli varð stovnaður í 1870; tá sum sum mangan seinni, tá ið tað hevur snúð seg um skúla og mentan, spurdu teir ráðandi, um tað nú loysti seg og um tað ikki var betri og lættari at senda føroyingar í læraraskúla í Danmark; onkur embætismaður ávaraði um, at tað kundi hava separatistiska ávirkan, at føroyskir lærarar vóru útbúnir heima í Føroyum. Barnaskúlar komu um landið um hesa tíðina: Símun av Skarði gekk í skúla í heimbygdini, lærarinna var Bergitha Eliasen norðan úr Vági. Hon hevði ikki læraraprógv. Hon var lærarinna í Kunoy, Haraldsundi og á Skarði.

Føringatíðindi kom út frá 1890, og Símun av Skarði segði, at hann las tað, til hann dugdi tað uttanat. So kærkomið var tað at fáa føroyskan lesnað.

Árini 1893-96 gekk Símun í Læraraskúla í Havn.

Av tí valaliði, sum gekk saman við honum og fekk stóran týdning fyri hann, er fyrst er at nevna Sonnu á Húsum í Havn, sum hann trúlovaðist við, meðan tey gingu í Læraraskúla. Harumframt skyldmaðurin Símun Pauli Konoy og Jákup Dahl, seinni próstur. Í læraraskúlanum fór undirvísingin fram á donskum. Tí vendu næmingarnir sær í 1894 til Føringafelag og bóðu um hjálp til at fáa føroyskt inn í skúlan. Føringafelag svaraði, at tað var vónleyst; felagið hevði árið fyri skrivað til skúlastjórnina og biðið bønliga um at fáa føroyskt inn í læraraskúlan, tí tað hevði nógv at týða, at lærararnir dugdu móðurmálið væl; nógvir fóru at virka á bygd millum børn, ið aldrin høvdu hoyrt danskt orð, uttan tá ið lestur varð lisin sunnudag. Men skúlastjórnin svaraði nei, har vóru so nógvar lærugreinir, at har var ikki rúm fyri føroyskum. Jóannes Patursson yrkti um hetta í *Føringatíðindi* eina yrking við stevinum "Í Havnar skúla har er so trongt, at móðurmálið er úti stongt."

Tað man hava verið hugurin at broyta hesi trongu viðurskifti og búgva seg til tess, sum gjørdi, at Símun ikki fór í lærarastarv og gifti seg, tá ið hann var liðugur í læraraskúlanum í 1896, 24 ára gamal.

Háskúlarnir eru sprotnir av evropeisku fólkastýrisrørsluni. Tað var ikki longur nóg mikið at fólk dugdu at lesa katekismus og skriva navnið. Tað var neyðugt at hugsa sjálvstøðugt og at kenna seg sjálvan og søgu sína og mál. Fyrsti danski háskúlin varð stovnaður í 1844 í Rødding í Suðurjútlandi, men tá ið Danmark misti Suðurjútland í 1864, varð hann fluttu norðurum. Árið eftir varð Askov háskúli stovnaður millum Kolding og Esbjerg. Hann gjørdist fremsti háskúli í Norðurlondum, tiltikin fyri góðar lærarar, sum eisini stóðu í fremstu røð millum granskarar.

Føroyingum stóð frá 1869 í boði at fáa ríkisstyrk eins og aðrir ríkisborgarar til at fara á háskúla, og í 1873 fóru fyrstu føroyingar á háskúla í Danmark.

Tey 20 árini frá 1879 til 1899 vóru 184 føroyingar á háskúla í Danmark. Men studningurin var lítil, og tað var dýrt at gjalda fyri ferðina og skúlan, og tað gjørdi, at nógv komu ongantíð heimaftur, tey fingu sær arbeiði og vórðu verandi. Tær flestu av gentunum vórðu verandi, tær fóru at tæna, og tær giftust.

Av teimum 15 næmingunum tað fyrsta háskúlaskeiðið, 1899, vóru 7 úr Klaksvík. Hinir vóru úr Norðoyggjum, norðaru helvt av Eysturoy og Kirkjubø. Árið eftir vóru eisini næmingar úr Sandoy og Vágum. Í 1901 var fyrsti næmingurin úr Havn, Hans Andrias Djurhuus skald. Og í 1902 vóru Skúvoy og Suðuroy eisini umboðaðar.

Tey fyrstu 20 árini, sum Føroya Fólkaháskúli virkaði, frá 1899 til 1919, vóru 208 næmingar á skúlanum úr øllum oyggjum uttan 4 teimum smæstu. Tað er lætt at skilja av tølunum, hvussu stóran týdning skúlin beinanvegin fekk. Men tað er so mangt annað, sum eisini sigur okkum tað.

Nýklaktur lærari fór Símun á Askov. Har hitti hann fyrstu ferð Rasmus, sum hevði verið á einum øðrum navnfromum háskúla, Vallekilde, og lært seg handverk. Teir gjørdust ógvuliga góðir felagar og lovaðu hvør øðrum, at teir saman skuldu stovna háskúla í Føroyum; frá



*»Tað var ikki pengaríkidømi, sum gjørdi, at tað eydnaðist. Ei heldur vóru tað framúrskarandi likamsevnir. Men tað var viljin til at samstarva fyri at lyfta Føroya fólk upp til tilvit og kunnleika um egnan mátt og megi, mál og mentan, til at gera tey før fyri at mennast sum einstaklingar og tjóð.«*

*Turið Sigurðardóttur í Føgrulíð 2009*

*»Tann søguleysi sær einki her uttan haga, seyð og eina húsagrund. Tann, sum kennir søguna, sær fyri sær ungdóm úr øllum Føroyum, lærarar og lærarindur, eitt yðjandi lív við samrøðu, sangi, fyrilestrum, kjaki, handarbeiði, fimleiki og spæli. Í fríløtum seiðaberg og dyrging. Sær Rasmus læra næmingar hægri rokning og natúrlæru og Símun læra teir Føroya søgu og at skriva føroyskt.«*

*Turið Sigurðardóttur í Føgrulíð 2009*